

# Hvilvtennið fekk stórfingna móttøku

*Hóast eitt sindur av beiskleika, tí føroyingar ikki vildu vera við í fíggingini av skipinum, so eru tað bjartskygdir eigarar, sum í næstum stevna vestur í hav á rækjuveiðu við nýggja skipinum*



*Kokkurin Gunnar Svartá hevur verið við Kjartani frá byrjan fyrst í sjeyti árunum*

Jústinus Leivsson Eidesgaard
Myndir:
Jens Kr. Vang

**Fuglafjørður:** Í Lorvík og í eystara parti av Eysturoynni var stórur dagur týsdagin. Seinnapartin týsdagin kom nýggjasta far í føroyska fiskiflotanum til landið. Tað er Hvilvtenni hjá Kjartan Joensen í Lorvík. Hvørt mannsbarn var á fótum, tá skipið dagaði undan suðri í Lorvíksfirði og kom skúmandi inn móti bygdini. Skipið stingur so djúpt, at ikki ber til at leggja at í Lorvík, men teir gloymdu ikki gamlan sið, at sigla tríggjar ferðir í kring við sólini, ein siður, føroysk skip hava nýtt, tá tey fara nýggjan túr.

Hvilvtennið fór ikki beinleiðis á nýggjan túr týsdagin, men legði leiðina inn á Fuglafjørð, har móttøka var fyri skipinum. Hornorkestur spældi og kórsangur ljómaði og Kjartan og hansara menn, sum hava verið undangongumenn innan føroyska rækjuveiðu, stóðu rørdir á brúnni, áðrenn landgangurin spakuliga var heysaður niður á brúnna.

Og Hvilvtenni sá veldugur út, har hann lá við bryggju í Fuglafirði. Hetta er eitt av teim størstu skipunum í landinum, halda við stóra svartkjaftatrolaran hjá JFK- trol, Næraberg, uttanfyri.

Her er nýggjasta tøknin innan rækjuveiðu og tilvirkan av rækjum savnað á einum stað og djúpt niðri í skipinum liggja 7500 hestar og bíða eftir at sleppa á royna seg á sløttu undirsjóarfjøllunum og í líðunum á Flemmish Cap, vesturi í Atlantshavi.

Fleiri manns hava verið leingi saman við Kjartan og fiska. Kokkurin á myndini, Gunnar Svartá hevur verið við frá byrjan fyrst í sjeytiárinum.



*Kjartan Joensen, reiðari og skipari á Hvilvtenni fyrsta túr*

### Vónbrotin

Undir hátíðarhaldinum og fyri Sosialinum í seinastu viku gjørdi Kjartan Joensen, reiðari, greitt, at hann er sera vónbrotin av, at Framtaksgrunnurin ikki trúði á hansara verkætlan, tá ið hann fór undir at fyrireika byggingina av nýggja Hvilvtenni.

Tað bar snøgt sagt ikki til at fáa nakran at seta í skipið í Føroyum. Tí heitti hann á Frank Uhrenholt, sum er virkin innan rækjuvinni, at seta í skipið og hann eigur í dag 33 triðingin í skipinum.

Nógvur eginpeningur er í Hvilvtenni og vónirnar fyri at skipið fer at bera seg eru góðar

– Vit hava fingið eitt vakurt og effektivt skip, segði Kjartan Joensen, við Sosialin, seinasta fríggjadag, tá skipið gjørdi klárt at fara úr Noregi. Og hann legði afturat:

– Oljuprísurin er ikki heilt við okkum í løtuni, men tað kemur eisini ann upp á hvussu vit hyggja upp á tað. Í 1985 kostaði oljan fyri skip 2.68 kr fyri liturin. Prísurin á rækjum lá tá um 12 krónur fyri kiloið. Í dag hava vit bunkra fyri 2.32 kr. og nú liggur rækjuprísurin um 14 krónru fyri kiloið. Tað hevur sæð verri út fyrr, sigur Kjartan Joensen.

– Men vit kom at brúka nógva olju. Tá eg byrjaði fyrst í sjeyti árunum við Vesturvarða høvdu vit 460 hestar tøkar. Nú hava við 7500. Lemmarnir tá vóru ikki størri enn eitt kuffert, eg lyfti einum lættliga, og Regin Vágadal hevði lyft báðum sum einki. Lemmarnir viga í dag seks tons hvør, sigur Kjartan Joensen.

Vit skrivaðu annars í seinastu viku, at Hvilvtenni skuldi fiska fyri eina millión um dagin tá hann var til fiskiskap. Hetta er sjálvsagt skeivt. Tað skuldi standa eina millión um vikuna.



*Børnini fingu sodavatn*



# Samráðast fyrsta dagin

*Landsstýrið hevur havt samband við danska forsætisráðið um ávegis samráðingarnar millum Høgna Hoydal og Frank Jensen, og roknast kann við, at fundur verður teirra millum í næstum*

John Johannessen

Útlit eru nú fyri, at samráðingarnar millum danska løgmálaráðharran og føroyska landsstýrismannin í lógarmálum um teirra økir í fullveldismálinum verður hildin í næstum.

Talan er um ein ávegis samráðingarfund, sum Anfinn Kallsberg og Poul Nyrup Rasmussen avtalaðu, eftir at tað var greitt, at tað ikki bar til hjá donsku stjórnini at koma til Føroya at samráðast.

Embætismannaverkið á løgmansskrivstovuni hevur havt samband við danska forsætisráðið, og væntar sær í dag ella í morgin at fáa at vita, nær tað ber til hjá danska løgmálaráðharranum at koma til Føroya.

### Økið skal avgreiðast

Uppskotið, um at ávegis samráðingarfundir skuldu haldast áðrenn sjálvan samráðingarfundin 26. oktober, eigur danski forsætisráðharrin. Hetta skjýtur hann upp í brævi til løgmans 21. juli, tá hann sigur løgmanni, at tað ikki ber til hjá donsku stjórnini at koma til Føroya at samráðast.

Í brævi til danska forsætisráðharran 5. september tekur løgmaður undir við hugskotinum. Men løgmaður setir treytir.

Treytirnar frá løgmanni eru, at partarnir skulu koma til eina endaliga politiska støðutakan fyri heimarætt og borgararættindi, umsitingarligt samstarv og gjaldoyrasamstarv. Harafturat krevur løgmaður, at fundirnir síðani skulu verða hildnir í Føroyum.

Ætlanin er, at danski búskaparmálaráðharrin, Marianne Jelved, skal samráðast við føroyska fíggjarmálaráðharran, Karsten Hansen, um gjaldoyrasamstarvið. Frank Jensen, løgmálaráðharri, og Høgni Hoydal, landsstýrismaður í lógarmálum, skulu samráðast um restina.



Eftir, at danska fólkið hevur sagt nei til evruna, og krónan tískil heldur fram at vera gjaldoyra, verður fundurin millum Marianne Jelved og Karsten Hansen mettur at vera óneyðugur.

Sum skilst á landsstýrinum, skulu vit tó vænta, at fundurin millum Høgna Hoydal og Frank Jensen verður veruleiki. Væl at merkja, um danski løgmálaráðharrin áðrenn fundin er sinnaður at finna eina felags politiska støðutakan um tey øki, teir á fundinum skulu samráðast um.

### Stjórnin sigur ósatt

Síðani løgmaður sendi danska forsætisráðharranum bræv 5. september, hevur einki formelt brævaskifti verið teirra millum. Og nú knøpp tíð er til samráðingarfundin 26. oktober, eru partarnir farnir at geva hvørjum øðrum skuldina fyri, at eingin av ávegis samráðingarfundunum enn er hildin.

Høgt standandi embætisfólk hjá danska forsætisráðharranum søgdu við Sosialin í gjár, at orsøkin til, at fundurin millum Frank Jensen og Høgna Hoydal enn ikki er hildin er, at Frank Jensen bíðar eftir einum útspæli frá Høgna Hoydal til fundin. Frank Jensen var sambært embætisfólkunum annars klárur at koma til Føroya á fund.

Hesar grundgevingarnar eru í oyrunum á Høgna Hoydal púra burturvið. Tí føroyingar hava alla tíðina verið klárir at samráðast. Og útspælið, donsku embætisfólkini tosa um, kenna danir frá samráðingarfundunum. Tí heldur Høgni Hoydal tað vera beinleiðis ósatt at siga, at danir bíða eftir føroyingum.

# Samráðingar millum Føroyar og ES

*um fiskirættindasáttmála fyri 2000*

Samráðingarnar millum Føroyar og ES um sínámillum fiskirættindasáttmála fyri 2001 vórðu í Tórshavn 9.-10. oktober 2000. Samráðingarnar endaðu við, at avtala varð gjørd fyri 2001 um veiðurættindi á júst sama støði sum fyri 2000. Allar kvotunøgdir hjá føroyskum skipum í ES og grønlendskum sjógvi eru óbroyttar, og kvotunøgdirnar hjá ES skipum í føroyskum sjógvi eru tær somu.

Tó varð tann broyting gjørd, at ES skip í 2001 — sum eina roynd — fáa møguleika at veiða meira av langasporli og stinglaksi burtur av tí samlaðu longu- og blálongukvotuni; heildarkvotan, 3.600 tons, er óbroytt. Hesin møguleikin verður endurskoðaður undir komandi samráðingum næsta ár við atliti at møguleikum hjá føroyskum skipum at fáa rúmari atgongd at fiska tær kvotur, sum verða avtalaðar millum partarnar.

Tann óbroytta avtalan merkir, at føroysk skip eisini í 2001 kunnu fiska ávísa nøgd av makreli burtur av tí føroysku strandarlandakvotuni í ES sjógvi. Hetta var ein stríðsspurningur í samráðingunum fyri 2000, men sum varð loystur eftir 2. samráðingarumfar.

Triðjalond — serliga Noreg, sum fiska í tí áður umstríddu leiðini á markinum millum Føroyar og Bretland, hava fleiri ferðir heitt á Føroyar og ES um at fáa eina greiða skipan fyri, hvussu fráboðanarreglurnar eru á hesi leiðini. Higartil hava skipini boðað frá til báðar partar og sama veiðunøgd hevur verið tikin burtur av hjá hvørjum.

Nú ein endaliga avtala er gjørd við Bretland um fiskimarkið har á leiðini, er greitt grundarlag hjá Føroyum og ES í fiskirættindahøpi at taka henda spurningin til viðgerðar. Hetta varð gjørt á fundinum í Tórshavn.

Semja er m. a. um,

- at partarnir skulu lata hvørjum øðrum upplýsingar um fiskiloyvi, sum eru latin skipum úr triðjalondum við rættti at fiska í serøkinum,
- at um báðir partar hava givið skipi fiskiloyvi, verður veiðunøgdin roknað helvt um helvt av kvotunum latin frá hvørjum partinum. Hevur bert annar parturin latið fiskiloyvi, verður øll veiðan roknað av kvotunum latin av hesum partinum,
- at skip úr triðjalondum, sum hava fingið loyvi at fiska í serøkinum, skulu vera undir fylgisveinaeftirliti, og partarnir skulu lata hvørjum øðrum hesar upplýsingar,
- at um eitt skip hevur fiskiloyvi frá báðum pørtum, skal hvør parturin útinna eftirlitið (enforce) samsvarandi sínum egnu teknisku reguleringum.

Hjáløgd er talva við yvirliti yvir avtalaðu kvoturnar.

**Fiskivinnustovan**
**11. oktober 2000**

| | Føroysk rættindi í fremmandum sjógvi (tons) 2000 | 2001 | Rættindi hjá øðrum tjóðum í føroyskum sjógvi (tons) 2000 | 2001 |
|---|---|---|---|---|
| **ES** | | | | |
| Toskur og hýsa | | | 500 | 500 |
| Annar botnfiskur | 3.065 26) | 3.065 26) | 14.860 31) | 14.860 31) |
| Makrelur | 4.680 27) | 9.600 27) | 3.890 | 4.360 |
| Sild | 1.160 28) | 1.160 28) | | |
| Lodna | 10.000 29) | 10.000 | | |
| Brisling, rossam. | 9.000 30) | 9.000 30) | | |
| Hvít.br., nebbasild | 18.000 | 18.000 | | |
| Svartkjaftur | 62.000 | 62.000 | 25.000 | 25.000 |
| Rækjur | 1.150 29) | 1.150 29) | | |
| **Tilsamans** | **109.055** | **113.975** | **44.250** | **44.720** |

*ES*

*26) Av hesum: 1.740 tons longa, blálonga og brosma, 400 tons annað (sum hjáveiða), 125 tons hemari, 150 tons svartkalvi við Vesturgrønland, 150 tons svartkalvi við Eysturgrønland, 500 tons kongafiskur við Eysturgrønland*

*27) Av hesum eru tey 4.360 tonsini av føroysku makrelkvotuni, sum er flutt at kunna verða fiskað í ES sjógvi (ICES øki VIa. Frá 1.oktober til 31. desember kunnu 1.580 tons veiðast eystan fyri 4°W (ICES øki IVa norðan fyri 59°N).*

*28) 660 tons vestan fyri Skotland og 500 tons í Skagerakk*

*29) Við Eysturgrønland*

*30) 2.000 tons av brislingi og 7.000 tons av rossamakreli*

*31) Av hesum: 2.500 tons upsi, 7.000 tons kongafiskur, 3.600 tons blálonga, longa, langasporl og stinglaksi, 1.000 tons flatfiskur (svartkalvi íroknaður), 760 tons annað. Veiðan av langasporli og stinglaksi kann í mesta lagi verða 1.080 tons av blálongu- og longukvotuni.*

*Makrelkvoturnar verða endurskoðaðar, tá strandarlondini hava gjørt avtalu um makrelfiskiskapin í 2001.*